## La Lina kølir Jørðina

Tað verður ikki so heitt á Jørðini í ár sum í fjør, og so løgið tað kanska ljóðar, so er tað havstreymurin La Lina, sum er orsøkin til broytingina. La Lina er eins og tann betur kendi El Nino ein havstreymur í Kyrrahavinum. Kanningar hava víst, at tað rákið er í hart í La Lina, kølnar tað á Jørðini, meðan tað er øvugt við El Nino. Í ár er hart rák í La Lina, og tí verður tað ikki so heitt í ár. Hinvegin vænta menn, at El Nino verður harðari næstu árini.



*Streymarnir í Kyrrahavinum hava stóra ávirkan á hitan á Jørðini*
*(Kort: Vísir)*



*Norsku útróðrarmenninir, Rolf Ervik og Leidulf Årvik úr Måløy, fingu herfyri heili 1400 pund av hav-áborrum í einum kasti*

# 1400 pund í einum kasti

**- Í fyrstani hildu vit, at tað var laksur, sum var í nótini, men skjótt sóu vit, at talan var um nakrar hundrað haváborrur. Vit gjørdust rættiliga ovfarnir, sigur Rolf Ervik, skipari á norska útróðrarbátinum, Havbris**

VEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tveir fiskimenn í Måløy, Rolf Ervik og Leidulf Årvik, fingu herfyri ein sjáldsaman og stóran fong. Teir royndu við snurrinót og fingu tilsamans 300 áburrur, sum er føroyska heitið fyri »aborre«.

Tað er blaðið Fjordenes Tidende, sum ber hesi tíðindi.

Hetta er dýrur fiskur, sum er meira vanligur í heitari sjógvi og syðri á jarðarhálvuni.

Fyri veiðina, sum vá tilsamans 1400 pund, fingu teir 46 krónur fyri kilo.

Tað hevur ikki verið óvanligt, at norskir útróðrarmenn av og á hava fingið nakrar einstakar áborrur, men tey 1400 pundini eru ivaleyst størsta nøgdin, sum fingin er ein útróðrardag.

- Vit fingu allan fiskin í einum kasti. Tað líka sum »kókaði« í nótini, tá ið vit tóku hana inn. Vit skiltu ikki heilt, hvat tað var, vit høvdu fingið. Í fyrstani hildu vit, at tað var laksur, men síðan sóu vit, at talan var um nakrar hundrað áborrur. Vit gjørdust rættiliga ovfarnir, sigur Rolf Ervik, skipari á útróðrarbátinum, Havbris.

Í Noreg vænta tey ikki, at áborrur fara at gerast ein náttúrligur partur av norskari fiskiveiði tey næstu árini, men lítil ivi er um, at tað er ein avleiðing av heitari sjógvi, at slík fiskasløg í so stórum nøgdum leita sær norðureftir.

Væntandi er, at fleiri og fleiri fiskasløg, sum vanliga halda til í heitari sjógvi, fara at leita norðureftir

Tað tók sína tíð hjá norsku útróðrarmonnunum at sannføra keyparar um, at teir høvdu fingið 1400 pund av áborrum.

– Vit noyddust at sannføra teir um, at fongurin var ein veruleiki – og ikki skemt, siga fegnu og ovfarnu útróðrarmenninir.

# FF meldað reiðaríið

**– Vit hava meldað reiðaríið hjá Carlton fyri, at menninir ikki hava fingið ognarlutirnar aftur, sum lógu eftir umborð á skipinum, tá ið teir fóru í land, men líkt er ikki til, at nakað hendir, sigur Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum**



*– Summir persónar verða ikki revsaðir, og tað vísir seg, at teir næstan kunnu ganga ígjøgnum heilt, sum Jan Højgaard tekur til*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

CARLTON-MÁLIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Einki røkist fyri, at Carltonmálið verður loyst í bræði. Skipið er til fiskiskap og landar í útlendskum havnum. Dekkarar og kokkur ganga framvegis heima, og í løtuni veit eingin, hvør endin verður á stríðnum millum reiðaríið og felagið hjá fiskimonnum.

Tað eru nú fimm vikur, síðan Fiskimannafelagið noktaði sínum limum at mynstra við Carlton, tí felagið metir, at reiðarin brýtir sáttmálan.

– Vit hava tosað við Føroya Reiðarafelag og biðið felagið syrgja fyri at hava skil á sínum limum, soleiðis at teir ikki bara gera, sum teir vilja. Vit hava ein sáttmála við reiðarafelagið og tað einasta, vit krevja, er, at sáttmálin verður hildin.

### Eingin ábyrgd

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, ásannar, at reiðarafelagið eftir øllum at døma ikki vil taka neyðugu ábyrgdina, nú ein av teirra limum fer um sáttmálaøkið, sum honum sjálvum lystir.

– Sjálvandi eru vit vónsviknir, tí tá vit gera eina avtalu, vænta vit, at hon verður hildin. Men formaðurin í reiðarafelagnum sigur, at teir kunnu ikki »spæla politi«, hóast Hanus Hansen, reiðari, sjálvur alment hevur ásannað, at sáttmálin er brotin.

Jan Højgaard ásannar, at ein av stóru trupulleikunum er, at reiðaríið hevur gjørt avtalu við hini manningarfeløgini sum merkir, at yvirmenninir fáa ein størri part av »køkuni« – og fiskimenn ein lutfalsliga minni part.

– Tað ber ikki til at gera avtalur við hini feløgini um hýrupart, sum síðan skal takast frá okkara limum. Slíkt kunnu vit ikki góðtaka, leggur hann dent á.

### Næraberg

Vit spurdu eisini formannin í Fiskimannafelagnum, hví FF hevur gjørt sáttmála við Hanus Hansen um, at nýggi Næraberg, sum heldur ikki hevur nót, kann avroknast við 17,5% til manningina, tá ið hann krevur, at manningin á Carlton verður avroknað við 27%.

– Vit hava gjørt ein royndarsáttmála fyri Næraberg í fyribils eitt ár, men hesin sáttmáli var treytaður av, at málið um Carlton kom upp á pláss. Hetta kunnu fýra av okkara stjórnarlimum vátta. Sáttmálin um Næraberg er bæði skrivligur og í øðrum førum munnligur.

Jan Højgaard sigur, at soleiðis, sum støðan er, verður royndarsáttmálin við reiðaríið aftanfyri Næraberg ikki endurnýggjaður.

– Hanus Hansen hevur ikki yvirhildið sín part av avtaluni, og tí fara vit ikki at ganga við til leingjan av hesum sáttmála.

### Hava meldað

FF hevur vegna limir sínar, sum nú eru í mynstringarbanni mótvegis Carlton, meldað reiðaríið fyri, at menninir ikki fáa sínar ognarlutir í land. Hetta eru klæðir og annað, sum lá eftir umborð, tá ið menninir fóru í land á seinasta túri fyri bannið.

– Jú, sjálvandi hava vit meldað reiðaríið, nú menn ikki fáa tað í land, sum teir hava liggjandi umborð. Men tað vísir seg, at her hendir einki. Summir persónar verða ikki revsaðir, og tað vísir seg, at teir næstan kunnu ganga ígjøgnum heilt, sum Jan tekur til.

Hann heldur ikki, at rættarskipanin virkar, sum hon eigur.

– Teir, sum fáa mest burtur úr hesi skipan, eru løgfrøðingarnir, sum at vísa seg ikki hava serliga stóran áhuga í, um vit hava rættvísi í Føroyum ella ikki.

Formaðurin í Fiskimannafelagnum undrar seg yvir, at Fiskiveiðieftirlitið ikki fer út og tekur Carlton til lands.

– Tá ið eingin dekkari er við skipinum, og manningarskjølini ikki eru í lagi, verður lógin brotin. Tað er óskil, at skipið soleiðis sleppur at sigla ótarnað, sigur Jan Højgaard.